LM-025/2020

heilsutrygd

1

Heilsumálaráðið
Att: Guðrun Maria Mortensen, fulltrúi

Klaksvík, tann: 6. juli 2020

Mál: 20/01279-2
(at tilskila i svari)
Viðgjørt: Petur Martin Hansen

Hoyringskriv til uppskot til Løgtingslóg um royndarskipan um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til persónar millum 15-35 ár, sum hava angist ella lætt til moderat tunglyndi

Heilsutrygd tekur undir við uppskotinum til Løgtingslóg um royndarskipan um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til persónar millum 15-35 ár, sum hava angist ella lætt til moderat tunglyndi. Heilsutrygd hevur eina viðmerking til lógaruppskotið og tað er til grein 3 í lógaruppskotinum.

Viðmerking til grein 3.
Har stendur skrivað, at kæra um noktandi ávísing til ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð kann kærast til Kærunevndina í almanna-, familju og heilsumálum í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað kæraranum.

Heilsutrygd er av teirri fatan, at ein ávísing frá kommunulækna er eina læknafakliga avgerð, sum í verandi skipan ikki kann kærast til kærunevndina. Borgarin hevur møguleika at velja sær annan kommunulækna um hann ikki er nøgdur við sín kommunulækna. Borgarin kann eisini klaga til Landslæknan í samband við heilsufaklig viðurskifti.

Vinarliga

Petur Martin Hansen
Leiðslufulltrúi